## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin hækkar hann upp í landnyrðing og um kvøldið regn. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og um morgunin møguliga regn, men annars yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, um kvøldið møguliga hvassur vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og ælingur, partvís kavi, men sunnudagin minni vindur av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 6 stig.

# Sirkus vitjar í komandi viku

**Nú kunnu børnini byrja at gleða seg, tí í komandi viku vitjar Sirkus Arena í Føroyum, og tey lova undirhald til børn í øllum aldri, líka úr 3 upp í 93 ár**

SIRKUS
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sirkus Arena er ivaleyst tað sirkusið, ið oftast hevur vitjað her í Føroyum. Í ár hevur danska sirkusið havt 50 ára jubilum, og tí hevur verið gjørt serliga nógv burtur úr sýningunum hjá sirkusinum. Hetta hevur eisini sæðst aftur á talinum av áskoðarum, sum í ár hava verið ikki færri enn 300.000 í tali.

### Fýra sýningar

Danska sirkusið kemur til Føroyar mikudagin í komandi viku, og tann fyrsta av teimum íalt fýra sýningunum í Føroyum verður longu hóskvøldið. Tá verður sýning í høllini í Trongisvági. Fríggjakvøldið verður sirkusið í Havn, leygardagin í Klaksvík og seinasta sýningin verður sunnudagin í høllini í Runavík.

Sýningarnar í Føroyum verða áleið tveir tímar langar, og áskoðararnir fáa høvi at uppliva eitt nú ballónklovnina Samson, meistaraskjúttan Cowboy Joe, og sum ein heilt serligan gest hevur Sirkus Arena fingið navnframa Dario Campeotto við á rundferð. Hesin fer at framføra eina heilt serliga Kim Larsen parodi.

Umframt teir omanfyri nevndu verða fleiri aðrir luttakarar, so sum Pjerrot og sirkusstjórin Benny Bardino, ið hevur vitjað í Føroyum óteljandi ferðir.



*Sirkus Arena hevur vitjað í Føroyum óteljandi ferðir, og nógvir føroyingar kenna væl bæði Pjerrot og sirkusstjóran Benny Bardino*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 15 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 24 |
| Athen | -- |
| Malta | 24 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 19 |
| New York | 17 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1034 hPa. yvir Suður-Noreg fer í landsynning og viknar. Eitt lágtrýst, 1007 hPa. sunnan fyri Írland fer í útnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer vestureftir og brúgvalagið haðani til Skotlands kemur hendavegin.

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/10 kl. 06[00]– 16/10. 06[00]. Hitin í gjár: 10,1°
Minsti hiti máldur í okt.: - 4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 17/10 kl. 06[00]– 18/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 81,8 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

14. oktober Mánin næstur jørðini
17. oktober Fullmáni
25. oktober Seinna kvarter
26. oktober Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. Okt. | 06.52 | 19.16 | 05.52 | 18.16 | 06.07 | 18.31 | 08.52 | 21.16 | 09.52 | 22.16 | 05.07 | 17.31 | 04.07 | 16.31 | 07.07 | 19.31 | 08.07 | 20.31 | 06.37 | 19.01 | 07.52 | 20.16 |
| 18. Okt. | 07.41 | 20.05 | 06.41 | 19.05 | 06.56 | 19.20 | 09.41 | 22.05 | 10.41 | 23.05 | 05.56 | 18.20 | 04.56 | 17.20 | 07.56 | 20.20 | 08.56 | 21.20 | 07.26 | 19.50 | 08.41 | 21.05 |
| 19. Okt. | 08.29 | 20.54 | 07.29 | 19.54 | 07.44 | 20.09 | 10.29 | 22.54 | 11.29 | 23.54 | 06.44 | 19.09 | 05.44 | 18.09 | 08.44 | 21.09 | 09.44 | 22.09 | 08.14 | 20.39 | 09.29 | 21.54 |
| 20. Okt. | 09.20 | 21.46 | 08.20 | 20.46 | 08.35 | 21.01 | 11.20 | 23.46 | - | 12.20 | 07.35 | 20.01 | 06.35 | 19.01 | 09.35 | 22.01 | 10.35 | 23.01 | 09.05 | 21.31 | 10.20 | 22.46 |
| 21. Okt. | 10.13 | 22.39 | 09.13 | 21.39 | 09.28 | 21.54 | - | 12.13 | 00.46 | 13.13 | 08.28 | 20.54 | 07.28 | 19.54 | 10.28 | 22.54 | 11.28 | 23.54 | 09.58 | 22.24 | 11.13 | 23.39 |

5 707265 100036 >